# Kvinnur og dómari avstað

**FLOGBÓLTUR** Í døgunum frá 3. til 7. juni fer kvinnulandsliðið í flogbólti til Liechtenstein at spæla EM-undankapping ímóti Kypros, Skotlandi og Liechtenstein, og somuleiðis skal altjóða flogbóltsdómarin, Jan Hentze, døma dystir í hesi somu kapping




**Á FLOG**

*Kvinnulandsliðið í flogbólti, sum fer til EM-undankappingina í Liechtenstein. Aftast frá vinstru: Birgit Guttesen, Birita Joensen, Anja Sonnedóttir Danielsen, Karina Poulsdóttir Debes, Sofia Purkhús, Gudrid Nolsøe og Helga Guttesen. Fremst frá vinstru: Rakul Dalsgaard Jakobsen, Katrin Petersen, Margit Gaard Joensen, Eina Stephania Kalsø og Karin Mikkelsen*

Hilmar Jan Hansen

Fyrsti dysturin á Liechtenstein-ferðini hjá flogbóltskvinnunum verður ímóti Kypros fríggjadagin 4. juni, síðani verður spælt ímóti Skotlandi leygardagin 5. juni og at enda ímóti Liechtenstein sunnudagin 6. juni.

Landsliðsvenjarin, Kristian Mikkelsen, hevur úr fýra feløgum tikið út 12 kvinnur til undankappingina, har tað ræður um at gerast nummar eitt ella tvey, so liðið kann sleppa víðari til endaumfarið, sum verður í Luxembourg næsta ár.

Úttiknu spælararnir eru Anja Sonnedóttir Danielsen, Karina Poulsdóttir Debes, Rakul Dalsgaard Jakobsen og Birita Joensen úr Fleyr, Birgit Guttesen, Margit Gaard Joensen, Eina Stephania Kalsø og Sofia Purkhús úr Mjølnir, Helga Guttesen og Karin Mikkelsen, SÍ, og Gudrid Nolsøe og Katrin Petersen úr TB.

Føroyska kvinnulandsliðið hevur fyrr møtt øllum trimum londunum, spælt verður ímóti. Tá EM-undankapping var í Føroyum fyri tveimum árum síðani, vunnu Føroyar 3-1 á Skotlandi, men taptu 0-3 fyri Liechtenstein.

### Jan skal døma

Umframt kvinnurnar, ið fara avstað, fer eisini altjóða flogbóltsdómarin, Jan Hentze, til somu kapping í Liechtenstein, har hann skal vera dómari í bólki A frá 4. til 6. juni. Í dystinum millum Skotland og Kypros verður hann fyrsti dómari, og í dystinum millum Liechtenstein og Kypros annar dómari.

Hetta er ikki einasta altjóða avbjóðing hansara í næsta mánaði, tí eisini frá 17. til 19. juni skal hann døma í bólki A í EM-undankappingini fyri smátjóðir hjá monnum, sum verður í Andorra. Tá verður hann fyrsti dómari í dysti millum Skotland og Kypros, og annar dómari í dysti millum Andorra og Skotland.

Við í hesi seinnu kappingini er eisini føroyska manslandsliðið, hvørs venjari er Romica Øster. Føroysku flogbóltsmenninir eru í bólki saman við Kypros, Skotlandi, Írlandi og Andorra.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Statoil Faroes stuðlar súkklunum

**SÚKKLING** Tá stóra súkklukappingin kring Føroyar verður í juli mánaði, verður tað við nýggjum høvuðsstuðli, Statoil Faroes, og tí eitur kappingin aftur hesa ferð Statoil Kring Føroyar. Hetta er fimtanda árið, at Tórshavnar Súkklufelag skipar fyri kappingini




**SÚKKLAÐ VIÐ STATOIL**

*Sáttmálin við nýggja høvuðsstuðulin hjá súkklukappingini, Statoil Kring Føroyar, varð undirskrivaður í Kaffihúsinum á Bryggjubakka seinnapartin í gjár. Frá vinstru Geyr Gilsteinsson, formaður í Tórshavnar Súkklufelag, og Louisa A. Fjalsbak, umboð fyri Statoil Faroes*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

Hilmar Jan Hansen

So nærkast aftur tíðin, tá bæði føroyskir og útlendskir súkklarar eftir fimm døgum fara at kappast kring landið. Hesa ferð verður stóra súkklukappingin frá 21. til 25. juli, og súkklað verður í Klaksvík, Eysturoynni, Suðuroynni, Vágum og Streymoynni.

Hetta er fimtanda árið, at Tórshavnar Súkklufelag skipar fyri kappingini, ið hesi árini hevur havt heitið Statoil Kring Føroyar. Tað fer kappingin aftur at eita í ár, men tó er talan um ein nýggjan høvuðsstuðul hesa ferð, Statoil Faroes, ið fæst við oljuleiting í føroyskum øki og er partur av altjóða oljufelagnum, Statoil.

Í gjár var tíðindafundur í Kaffihúsinum á Bryggjubakka, har Geyr Gilsteinsson, formaður í Tórshavnar Súkklufelag, og Louisa A. Fjalsbak, umboð fyri Statoil Faroes, skrivaðu undir nýggja samstarvs- og stuðulssáttmálan, sum fyribils er galdandi fyri kappingina í ár. Sostatt fær kappingin nýtt búmerki og nýggjar litir, men líkist annars sær sjálvari.

– Vit eru sera glaðir fyri, at vit hava fingið í lag samstarv við Statoil Faroes, sum verður okkara høvuðsstuðul í ár. Báðir partar eru nøgdir við ta avtalu, vit hava gjørt, so nú verður spennandi at royna hetta samstarvið, sigur Geyr Gilsteinsson.

– Kappingin er aftur í ár skipað sum liðkapping, samstundis sum einstaklingar eisini kunnu kappast. Hetta varð roynt við sera góðum úrsliti í fjør, og tí verður við spenningi sæð fram til, hvussu tey ymsu liðini verða mannað. At stórur útlendskur áhugi er fyri kappingini, ger tað ikki minni spennandi at skipa fyri.

### Nógvar tilmeldingar

Higartil hava longu 27 súkklarar meldað seg til, og tað er óvanliga nógv, tá framvegis næstan tveir mánaðir eru eftir til kappingina. Av teimum 27 eru 18 danskir súkklarar og restin eru so føroyingar. Men væntandi koma eisini nakrir íslendingar aftrat, umframt fleiri føroyingar.

– Vit vita, hvussu tað er, at summi altíð koma í síðstu løtu, men tí hava vit eisini pláss fyri. Men so skal eisini sigast, at tað hjálpir sjálvandi okkum sum fyrireikarar sera væl, um súkklarar boða frá í góðari tíð, at teir ætla sær við, sigur Geyr Gilsteinsson.

– Hóast kappingin er sær sjálvari lík, verða onkrar broytingar. Millum annað fara vit ikki í Sandoynna, men í Vágar í staðin. Somuleiðis verður súkklingin í Suðuroynni í ár fríggjadag og ikki leygardag, sum hon plagar at vera, tí við at flyta eitt sindur um upp á tað heila, fæst meira burtur úr tí frítíð og hvíld, súkklararnir eisini hava brúk fyri hasar dagarnar.

Byrjað verður við prologi í Klaksvík mikukvøldið 21. juli, og síðani verður hildið fram 110 kilometra longum teini úr Havn til Runavíkar hósdagin, 77 kilometra langa Suðuroyarteininum fríggjadagin, 30 kilometra longum einkultstarti í Vágum leygardagin og at enda Streymoyarteininum sunnudagin, sum er 109 kilometrar.

*hilmarjan@sosialurin.fo*